# Vága kommuna

## FUNDARBÓK 2013

**38**/27-09-2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur** **nr. 11.**<br>Tíð: **25. september kl. 18$^{00}$.**<br>Stað: **Miðvágs Skúli** | Almennur fundur | |
| Fundardagar í 2013:<br><br>07/01, 30/01, 13/02, 27/02, 20/03, 17/04, 29/05, 19/06, 28/08, 25/09, | **Møtt:**<br>Johannes Ellefsen, Dánial Johansen, Marjus Dam, Rósa Samuelsen, Egil Petersen, Jógvan Sjúrður Hansen, Jonhard Joensen, Albert Ellefsen, Dánjal Thomsen, Marin Bláberg og S. Jóhannis Joensen.<br>Skrivari: Georg Hansen | **Uttan:**<br>Marjus Dam. |

| | |
|---|---|
| Mál nr. 2013-<br>Fyrsta viðgerð av fíggjarætlan fyri 2014. | Gjøgnumgingin. |
| Mál nr. 2013-00-00256<br>Uppskot um at leggja bæði kommunufeløgini saman.<br>F.N. mælir til at leggja kommunufeløgini saman.Mælt verður eisini til, at barnaverndarstovan og KAF vísa til aðalskrivaran hjá kommunufelagnum. | Samtykt at taka undir við at leggja kommunufeløgini saman.Mælt verður eisini til, at barnaverndar-stovan og KAF vísa til aðal-skrivaran hjá kommunufelagnum. |
| Mál nr. 2013-<br>Uppskot um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri býlingin á Ryggi soleiðis, at ásetingarnar eisini siga, hvørjar litir loyvt er at mála húsini.<br>Gunnar Hoydal hevur gjørt tilmæli í málinum.<br>T.N. mælir frá at broyta byggisamtyktina, men ístaðin at senda kunning um tilmælið hjá Gunnar til eigararnar av húsunum, sum eru umfatað av serstøku byggisamtyktini. | Samtykt ikki at broyta byggisamtyktina, men ístaðin at senda kunning um tilmælið hjá Gunnar til eigararnar av húsunum, sum eru umfatað av serstøku byggisamtyktini. |
| Mál nr. 2013-41-00247<br>Allan Hansen heitir á kommununa um at leggja ovara part av matr. nr. 123a í Miðvági til B-øki.<br>T.N. mælir frá at broyta býarplanin sambært umsóknini hjá Allan. | Samtykt ikki at broyta býarplanin sambært umsóknini hjá Allan. |
| Mál nr. 2013-42-00215<br>Umsókn um loyvi at endurnýggja MAGN-støðina á matr. nr. 233ar og 150c í Miðvági.<br>T.N. viðmælir treytað av, at friðingarmynduleikarnir geva loyvi. | Samtykt at geva byggiloyvi treytað av, at friðingar-myndulеikarnir geva loyvi. |

Fundurin lokin kl. 19$^{00}$.